ÓKEYPIS útkoyring í Tórshavn FÓÐURSØLAN

**Kvalitetsfóður til kettur og hundar**

Bílegg á telefon 50 20 22

SKYTTENs hunda- og kettufóður er framleitt síðan 1970 og inniheldur fisk og høsnarunga.

**Fóðurið inniheldur ikki...**
- haldevni
- aromaevni
- litevni
- sojaprotein



Hundafóður 20 kg SPECIAL bert 450,-

Kettufóður 15 kg KAT bert 390,-

Tel. 50 20 22 · info@fodursolan.com · www.fodursolan.com

# Aðalfundur

**Hjá Cøliakifelag Føroya verður 7.mai 2011 í MBF – húsinum kl. 15.**

**Fundurin verður settur kl. 15 við hesi skrá:**

*Kl. 15.00:* Marita Olsen, formaður í Cøliakifelag Føroya, bjóðar vælkomin.
*Kl. 15.15:* Kári Rubek Nielsen, serlækni í maga – tarmsjúkum, hevur fyrilestur um Cøliaki.
*Kl. 16.00:* Stegur
*Kl. 16.15:* Aðalfundurin verður settur, skrá sambart viðtøku felagins.

**Cøliakifelag Føroya**

**Suðuroyar Ellis- & Røktarheim**
FO-800 Tvøroyri
Tlf: 34 33 10 Fax: 37 12 53

# Frítíðaravloysarar

Søkt verður eftir frítíðaravloysarum í tíðarskeiðinum 15. juni til 31. august 2011 fyri:
- sjúkrarøktarfrøðingar
- heilsurøktarar / heilsuhjálparar / sjúkrahjálparar

Løn og setanartreytir sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri upplýsingar viðvíkjandi størvunum fáast við at venda sær til fyristøðukvinnuna Annu Djurhuus tlf. 34 33 10 lok. 3315.

Umsókn við avriti av prógvum v.m. skal sendast til:

Suðuroyar Ellis- & Røktarheim
att. Ronnié Midjord, stjóri
800 Tvøroyri

ella ser@ssh.fo

**Umsóknarfreist:** 25. apríl 2011.

# Fróðskaparsetur Føroya søkir eftir rektara

Starvið sum rektari við Fróðskaparsetur Føroya er leyst at søkja

**Starvsøki**
Sambært løgtingslóg nr. 58 frá 9. juni 2008 hevur rektarin dagligu leiðsluna av Fróðskaparsetri Føroya innan teir karmar, sum stýrið hevur ásett. Víst verður í hesum sambandi til Rektarafyriskipan frá 17. mars 2010.

Umsøkjarar eiga á heimasíðuni www.setur.fo at gera seg kunnugar við skjølini: Rektarafyriskipan; Fróðskaparsetrið, avbjóðingar og krøv til rektaran; Tíðarætlan og setanarnevnd.

**Førleikakrøv**
Í løgtingslógini um Fróðskaparsetur Føroya § 14, stk. 1 er ásett soljóðandi:

"Rektari skal hava royndir av leiðslu og kunnleika um granskingarumhvørvi, skal hava royndir og innlit í útbúgvingarøkið og hava skil fyri samspælið millum stovnin og samfelagið sum heild."

Somuleiðis verður kravt, at komandi rektarin hevur skjalprógvaðan granskingarførleika.

**Setanartreytir og umsókn**
Starvið sum rektari verður lønt í 39. lønarflokki sambært lønartalvuni fyri Tænastumannafelag Landsins, tó uttan at vera tænastumannastarv, og við 15% í eftirlønargjaldi.

Starvið verður áramálssett og setanartreytir annars verða ásettar í sersáttmála. Veitt verður viðbót áljóðandi 10% fyri áramálssetan.

**Umsóknarfreistin er 27. apríl 2011.**

Umsóknir saman við avriti av próvskjølum, CV og arbeiðsroyndum skulu sendast stýrisformanninum:

Herálvur Joensen
Sendistova Føroya í Keypmannahavn
Strandgade 91, 4. loft
1401 København K
Danmark

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Herálv Joensen, stýrisformann, á heralvurj@mfa.fo ella á tlf. +45 32833770.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo

HAVNAR FIMLEIKAFELAG 1909

# Fimleikaframsýningar

Fimleikaframsýningarnar hjá Havnar Fimleikafelag verða í ítróttarhøllini á Hálsi hesar dagar:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Leygardagin | 9. apríl kl. 10.00 | | Smábørn 1½-6 ár |
| Leygardagin | 9. apríl | kl. 13.30 | Børn 1. flokk til og við 3. fl. |
| Leygardagin | 9. apríl | kl. 17.00 | Ung 4. flokk til og við 6. fl. |
| Mánadagin | 11. apríl | kl. 19.00 | Vaksin 7. flokk og eldri |

**Havnar Fimleikafelag**

STUDNI
Student Grant Fund

## Skrivstovufólk/málsviðgeri

**Hálvtíðarstarv**

Eitt hálvtíðarstarv sum skrivstovufólk/málsviðgeri er leyst at søkja á Studna frá 1. mai 2011 ella skjótast gjørligt.

**Høvuðsuppgávur:**
- Umsiting av lestrarlánum
- Umsiting av innkrevjing
- Vanligar skrivstovuuppgávur

**Førleikakrøv:**
- Skrivstovuútbúgving, HH/student ella líknandi
- Royndir innan umsiting av lánum
- Royndir innan bókhald
- Góðan kunnleika í nýtslu av kunningartøkni
- Fyrikomandi og góð samstarvsevni
- Førleika til at arbeiða sjálvstøðugt

**Setanartreytir:**
- Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.
- Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um alt aðalráðið og deildir/stovnar tess.

**Umsókn:**
Umsókn við prógvum o.ø. skal sendast til:
**Studni**
*Stílað: Terja á Lakjuni*
Postrúm 3279
FO-110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 15. apríl 2011.

**Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Terja á Lakjuni á telefon 306565.**

*Studni er ein stovnur undir Mentamálaráðnum, ið hevur til uppgávu at veita fíggjarligan stuðul til lesandi føroyingar. Á Studna starvast 6 fólk. Stovnurin rindar mánaðarligan lestrarstuðul til umleið 3.000 lesandi í Føroyum og árligan ferðastuðul til umleið 1.300 lesandi uttanlands, umframt at veita lestrarstuðul til lesandi uttanfyri Norðurlond (ÚSUN). Harumframt krevur stovnurin inn lestrarlán frá umleið 2.000 persónum. Studni hevði í 2010 eina útreiðslujáttan uppá 2,8 mió. kr., og veitti uml. 107 mió. kr. í lestrarstuðli.*



Studni
Hoyvíksvegur 72
Postsmoga 3279
FO - 110 Tórshavn

tlf. 30 65 65
fax 30 65 66
studni@studni.fo
www.studni.fo

## Grundstykki í Sandavági

Matr, nr. 243b, Sandavágur, Steigabrekka 17, støðd 1522 $m^2$, til sølu um hóskandi boð fæst.

**Tlf. 510750 ella 282094**